# Forlagið Leirkerið – tvær nýggjar bøkur

**Forlagið Leirkerið í Øtu hevur givið út tvær nýggjar bøkur. Talan er um bøkurnar »Náði yvir náði« eftir Poul Madsen og »Tað besta, ið finst«, eftir Trolli Neutzsky Wulff. Páll á Lakjuni í Fuglafirði hevur týtt bøkurnar til føroyskt**

BØKUR
*Magnus Gunnarsson*

Forlagið Leirkerið í Gøtu hevur givið tvær nýggjar bøkur út. Páll á Lakjuni í Fuglafirði hevur týtt bøkurnar »Náði yvir náði« og »Tað besta, ið finst« til føroyskt. Bókin »Náði yvir náði« er skrivað av Poul Madsen. Hon er skrivað eftir bibliutímum, um høvuðstættirnar í Johannesar evangelium, sum hann helt í Keypmannahavn á vári 1952. Upprunaheitið á bókini er: »Nåde over nåde« Poul Madsen varð føddur 21. januar 1916 í Keypmannahavn og er so statt 87 ára gamal í dag. Sum blaðungur drongur kom hann at kenna Jesus sum sín persónliga frelsara. Hann las til løgfrøðing og arbeiddi í Innanríkisráðnum í umleið 10 ár. Hann fór sum heilt ungur at læra úr orði Guds. Í 1950 kendi hann kall frá Gudi at gevast við sínum lønandi arbeiði og at nýta tíð sína burturav í verki Harrans. Síðan hevur hann virkað sum bíbliulærari og ferðast nógv í Danmark og øðrum londum og lært í skriftunum. Hann hevur eisini fleiri ferðir verið í Føroyum. Hóast sín høga aldur er hann støðugt virkin og ferðast framvegis nógv í Danmark og eisini til onnur lond. Poul Madsen fæst eisini nógv við at skriva. Hann hevur m.a. síðani 1947 verið blaðstjóri á mánaðarblaðnum »Mod Målet«, sum er komið út í 63 ár.

## Tað besta, ið finst

Hin bókin, »Tað besta, ið finst«, er ein hugtakandi barnabók. Hon er um tvær systrar og mammu teirra, ið var einkja. Vit lesa um gerandisdag teirra bæði heima og í skúla, frá gleði og sorg, freistingum og sigrum. Samstundis sum hon viðger álvarsom evni, er hon ein spennandi barnabók, sum fangar lesaran. Bókin er ikki bert skrivað til undirhalds, men eisini til at vísa børnum og ungum vegin til eitt sigrandi lív og tað dýrabara virði í at hava eina góða samvitsku. Bókin er skrivað av Trolli Neutzsky Wulff, fødd Jørgensen. Hon er ættað úr Danmark og borin í heim í 1908. Nógvar bøkur eru komnar frá hennara hond, og hon hevur havt serstøk evni at skriva bøkur til børn og ung. Hon hevur dugað serstakliga væl at lýst stríð og vandamál teirra og ein veg út úr teimum. Bókin kom út á Filadelfiaforlaget í Oslo í 1949. Upprunaheitið á bókini er: Det beste i verden. Effzett í Gøtu hevur umbrotið og lagað bøkurnar til prentingar. BookPartner A/S í Danmark hava prentað og innbundið. Bøkurnar eru at fáa í bókabúðunum kring landið.




# Landsstýrið tekur ikki kommunur við uppá ráð

TÍÐINDASKRIV
*Føroya Kommunufelag*

Føroya landstýri hevur í fleiri ár mælt til at fáa eitt greiðari býti ímillum land og kommunur

Hóast hetta, uppliva kommunurnar ferð eftir ferð at Føroya Løgting lóggevur soleiðis

- At eyka útreiðslur við lóg verða lagdar á kommunurnar, við tí fyri eyga at minka um útreiðslur landskassans.
- At hetta, verður gjørt uttan samráð við kommunurnar.
- At allar meginreglur um greitt uppgávu og ábyrgdarbýti verða brotnar.

Seinastu dømini eru uppskotið frá landsstýrismanninum í almannamálum viðvíkjandi broytingum í forsorgarlógini, og uppskotið frá fíggjarmálaráðnum um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (FAS – skattur)

## Vantandi barnaansing

Í 2002 vóru sambært forsorgarlógini útgoldnar góðar 7 mill kr. frá Almannastovuni vegna vantandi barnaansing.

Við tí grundgeving at spara á lógarbundnu útreiðslunum á almannaøkinum, er lógaruppskot lagt fram ið áleggur kommuninum at endurrinda Almannastovuni hesar útreiðslur við afturvirkandi kraft frá 1. jan. 2003.

Føroya Kommunufelag vil gera vart við, at

- Útreiðslur vegna væntandi barnaansing er ein partur av forsorgarøkinum. Forsorgarøkið er ikki lagt út til kommunurnar at umsita, og partar av hesum øki eiga ikki at verða lagdir út við tí grundgeving, at landskassin skal spara ímun til lógarbundnu útreiðslurnar á almannaøkinum.
- Útreiðslur verða lagdar á kommunurnar aftaná at fíggjarætlanin fyri 2003 er gjørd. Við øðrum orðum skulu kommunurnar finna 7 mill kr. innan teir karmar sum longu samtykta fíggjarætlanin hjá kommununum hevur.
- Við uppskotinum fáa kommunurnar álagt útreislur, tær ikki hava ávirkan á. Avgerðarheimmildin fer framvegis at liggja hjá Almannastovuni. Hetta er als ikki í tráð við meginregluna um, at fíggjarliga ábyrgdin skal fylgja avgerðarrættinum.

## Skattur – FAS

Á sama hátt hevur Landsstýrismaðurin fíggjarmálum lagt uppskot fyri Løgtingið sum við afturvirkandi kraft broytir býtið av FAS – afturbering ímillum land og kommunur.

Í viðmerkinginum til uppskotið verður sagt, at skattalættin ið latin var pensjónistum í 2002 kostaði kommuninum 5.5 mill kr. Breið politisk semja var tá um, at skattalættin ikki skuldi kosta kommununum nakað.

Sum kompensatión var broyting tískil gjørd í býtislutfallinum ímillum land og kommunur í samband við FAS – afturbering, soleiðis at kommunurnar komu at gjalda 5,5 mill kr minni í FAS-afturbering.

Hetta skal sambært fyriliggjandi uppskotið broytast aftur, við tí úrslitið, at kommunurnar í 2003 fáa ein eykaútreiðslu uppá 5,5 mill. kr.

Men sanleikin um skattalættan til pensjónistar er, sum eisini verður nevnd í viðmerkinginum til uppskotið, at

- kommunurnar fáa 19,7 mió. kr. minni inn í skatti, meðan landskassin fær 9,7 mió. kr. meira inn í skatti. (broytingar í ásetingarlógini, Løgtingsmál nr. 52-2001).

Fyri at minka um hesar skeivleikar var býtislutfallið í FAS-afturberingin broytt. Soleiðis at kommunurnar fingu (19,7 – 5,5) 14,2 mill. kr. minni inn í skatti og Landið bert fekk (9,7 – 5,5) 4,2 mill. kr meira inn í skatti.

Hetta verður við fyriliggjandi uppskotið broytt aftur, soleiðis at skattalættin til pensiónistar kemur at kosta kommununum 19,7 mill. kr. og landið fær 9,7 mill. kr. fleiri inn í skatti.

Sostatt hava hesi uppskotini økt útreiðslurnar hjá kommuninum við 32,4 mill. kr.

Føroya kommunufelag vil vísa á rundskriv frá Løgmálaráðnum sum millum annað sigur:

»Er ein uppgáva kommunal so skal kommunan fíggja hana , men er hon ein landsuppgáva, so skal landið fíggja hana . Hetta hevur so við sær at bara tey, ið taka avgerðir kunnu áleggja sær sjálvum fíggjarligu ábyrgdina av avgerðinum.«

» Mælt verður til at land og kommunur í felag ráðleggja og raðfesta, hvussu viðurskifti teirra millum verða skipað«

Føroya Kommunufelag vil við hesum heita á Føroya Løgting um, at nýta hesar meginreglur í sínum arbeiði.

| | 2002 Land | 2003 Kommunur | Land | Kommunur |
|---|---|---|---|---|
| Vantandi barnaansing | –7,2 mill. | 0 | 0 | –7,2 mill. |
| FAS – Skattur | –5,5 mill. | 5,5 mill. | 5,5 mill. | –5,5 mill. |
| Skattalætti | 9,7 mill. | –19,7 mill. | 9,7 mill. | –19,7 mill. |
| Tilsamans | 3,0 mill. | –14,0 mill. | 15,2 mill. | –32,4 mill. |

# Føroya Skipaskráseting ásetur skrásetingargjøld

TÍÐINDASKRIV
*Fiskimálaráðið, 11. apríl 2003*

Fiskimálaráðið boðar við hesum tíðindaskrivi frá, at frá 1. mai 2003 verða gjøld kravd fyri skráseting av pantibrævi, ognarbrævi og útflýggjan/rætting av tjóðskaparbrævi.

Tað er við heimild í § 8 í løgtingslóg nr. 9 frá 5. mars 1970 um skráseting av skipum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 75 frá 23. mai 1997, at kunngerð verður sett í gildi um gjøld fyri skráseting í skipaskránni.

Gjaldið, sum er ásett til tess at uppfylla treytirnar ásettar av Løgtingsins fíggjarnevnd, byggir á eina einfalda prísáseting við føstum gjøldum.

Kunngerðin er ikki galdandi fyri skip við einum bruttoregistartonsatali ella bruttotonsatali undir 15, ið eru skrásett í Føroya Skipaskráseting, ella sum skulu skrásetast í Føroya Skipaskráseting.

Broytingar, átekningar, víkingar, strikingar o.a. vera framvegis ókeypis.

Avgjaldið, ið skal rindast, áðrenn skjølini kunnu útflýggjast, kann gjaldast við:

- kontantum peningi
- gjaldskorti
- kekki
- postuppkravi
- bankaflyting

Einasta kravi er, at prógv verður víst fram, at upphæddin er goldin.

**Gjøldini vera fylgjandi:**

- Skráseting av fíggjarligum rættindum: kr. 2.200,-
- Skráseting av skipsskeyti, sølusáttmála ella byggiváttan: kr. 2.800,-
- Útflýggjan av skrásettum tjóðskaparbrævi: kr. 3.000,-
- Rættingar gjørdar á tjóðskaparbræv: kr. 2.000,-
- Útflýggjan av fyribils tjóðskaparbrævi: kr. 3.000,-
- Ljósavrit av skipsblaði: kr. 200,-

ítróttur

Nr. 73 • týsdagur • 15. apríl 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Sumba og Mærsk skrivað sáttmála

**Ítróttarfelagið Sumba hevur fingið stóran høvuðssponsor. Sunnudagin skrivaðu Sumba og Mærsk undir sponsoravtalu**

SPONSORAVTALA
*Dagfinn Olsen*

Sunnudagin var stórur dagur í Sumba, tí eftir tógvi stríð og nógvar umsóknir, so vórðu sunnudagin undirskriftir settar undir avtalu við høvuðsstuðul. Og nýggi høvuðsstuðulin hjá Sumba er stóra fyritøkan Mærsk, sum føroyingar einamest kenna frá flúgving, men sjálvsagt eisini skipsferðslu.

## Størsti nakrantíð

Rúni Lisberg, formaður í Sumbiar Ítróttarfelag, fegnaðist á samkomu í Sumba um avtaluna við høvuðsstuðulin.

Hetta er úrslitið av drúgvum arbeiði og hetta er størsti stuðulin nakrantíð, segði formaðurin millum annað. Og sjálvandi minti hann á møguleikan at flúgva við Mærsk, eins og suðuroyingar so dúgliga hava gjørt.

Stig Albeck, marknaðarstjóri hjá Mærsk, fegnaðist eisini um nýggja sáttmálan. Hann segði, at umvegis Sumba, so verður komið um alla Suðuroynna. Umframt at vera høvuðsstuðul hjá sumbingum, so er eisini í avtaluni nakað við klæðum til kappróðrarfólk í Vági og føroyskar rógvarar í Danmarsk og sera fegin var Stig Albeck um, at 1. deildarliðið hjá kvinnum í Sumba hevur leikarar úr allari oynni.

Hann takkaði fyri stóru vælkomuna henda dagin í Sumba og fyri gestablídni, sum hann vónaði at kunna vísa aftur, tá flogið verður við Mærsk.

Mærsk hevur verið í Føroyum í meira enn 30 ár og metti marknaðarstjórin, at felagið er ein partur av føroyska samfelagnum. Tí er náttúrligt at stuðla og vóna stórt virksemi, so møguleiki kanska eisini verður fyri at stuðla víðari, t.d. við ferðum í samband við fótbólt.

Spurdur, hví eitt so stórur stuðul, sum Mærsk, stuðlar einum lítlum felag í útjaðaranum, sigur Albeck, at støddin ger ikki munin og at annað er vert at hyggja at, enn miðstaðarøkið.

- Útjaðarin er eisini partur av heildini og Mærsk er eitt gott navn her. Gott er at stuðla liðum her og so er gott at vit eisini umvegis hetta stuðla regattasiglingini, sigur Stig Albeck.

Mærsk er nú høvuðsstuðul hjá Sumba og aðrir stuðlar eru Alu Plast, M.H. Export, Suðuroyar Sparikassi. Sunnudagin varð sáttmálin undirskrivaður við Mærsk og til staðar vóru eisini umboð fyri aðrar stuðlar og fingu stuðlar eisini í gávu mynd eftir Jákup Hjaltalin

Sponsoravtalan millum Sumba og Mærsk er galdandi í eitt ár, men vóna partarnir at halda fram.



*Rúna Lisberg, Sumba og Stig Albeck, Mærsk. Sunnudagin skrivaðu Mærsk og Sumba undir sáttmála, sum ger Mærsk til høvuðsstuðul*

*Mynd: D. Olsen*

# Kasakstan hongur í klønum tráði

**Enn er eingin váttan fingin fyri, at landsliðið, sum um knappar tvær vikur skal spæla tveir dystir í Føroyum, sleppur at lenda í Europa**

LANDSDYSTUR
*Jóannes Hansen*

Fyrstu fótbóltslandsdystirnir í ár stunda nú av álvara til. Sambært skránni skal Kasakstan spæla á Svangaskarði annan sunnudag klokkan 16 og á Tórsvølli annan týsdag klokkan 18.45. Men eitt er, hvat er at síggja í skránni hjá Fótbóltssambandinum. Eitt annað er hvussu tað sær út í veruleikanum.

Veruleikin er tann, at tað enn ikki er fingin greiða á, um tað yvirhøvur fer at bera til at spæla landsdystirnar. Trupulleikin er, at enn er eingin vissa fingin fyri, at ferðalagið úr Kasakstan yvirhøvur fer at koma til Føroya.

– Vit hava arbeitt við spurninginum um innfararloyvi í fleiri vikur, men higartil er einki komið burturúr. Hetta sigur aðalskrivarin í FSF, Ísak Mikladal, og hann útgreinar soleiðis:

– Ì fyrstu atløgu fingu vit at vita, at tá steðgurin skuldi verða so stuttur, so var eingin trupulleiki at avgreiða loyvini á flogvøllinum í Vágum. So vildu vit hava eina skrivliga fráboðan frá løgregluni, sum vit kundu senda víðari til Kasakstan. Schengen samstarvið sigur jú, at tað er fyrsta floghavnin í Europa, sum fremmandu fólkini koma til, sum hevur ábyrgdina fyri, at alt er, sum tað skal, tá ið ferðaløgini fara víðari. Tí er tað alt avgerandi, at gestirnir hjá okkum hava pappír at vísa fram í Frankfurt og Keypmannahavn, har tað stendur, at loyvini skulu avgreiðast í Vágum. Men tá vístu tað seg at vera trupulleikar.

## UEFA upp í leikin

Fótbóltssambandið noyddist tískil at venda sær til Útlendingastýrið í Keypmannahavn. Og síðani hevur tað víst seg, at pappírsarbeiðið skal avgreiðast, áðrenn ferðalagið fer úr Kasakstan.

– Hetta er ikki sum at siga tað. Danmark hevur onga sendistovu í Kasakstan, og tað hava hini Norðanlondini heldur ikki. Tí er neyðugt hjá myndugleikunum í Kasakstan at snúgva sær til donsku sendistovuna í Moskva ella í Kiev. Higartil er einki komið burturúr hesum, og nú eru vit farin at ótolnast, sigur Ísak Mikladal.

Ætlanin er, at ferðalagið skal koma til Føroya leygardagin 26. apríl, og at tey skulu fara av aftur landinum 30. apríl.

– Vit hava fingið ein lista við umleið fimmti nøvnum á. Vit hava sent innbjóðingar til Kasakstan, soleiðis sum tað er ásett í lógum og reglum, men enn eru vit als ikki vísir í, at hetta fer at laga seg, staðfestir Ísak Mikladal, aðalskrivari í FSF.

Í vikuskiftinum boðaði FSF UEFA høvuðsskrivstovuni í Sveis frá, hvussu støðan er, og teir heittu á europeisku fótbóltssamgonguna um at hjálpa til við at fáa viðurskiftini í rættlag.

At tað ikki er lætt at samskifta eystureftir er einki nýtt. Ofta plaga viðurskiftini at laga seg, sjálvt um tað sær svart út. Tað mugu vit vóna, at tað eisini fer at gera hesa ferð. Men tað er neyðugt framvegis og støðugt at arbeiða. FSF tykist hava gjørt sítt. Spurningurin er so, hvussu tað verður at koma ígjøgnum frumskógin av pappírum, reglum og ásetingum, sum eru galdandi, tá ið ferðaløg eystaneftir koma til Europa og hava Føroyar og føroyskan fótbólt sum endamál.